

www.oljan.fo

**Jan Müller** 22 - 09 - 2011

# Oljuprísurin nógv fallin

Óttin fyri afturgongd í búskapinum hevur gjørt, at oljuprísurin er fallin nógv á altjóða marknaðinum í dag. Tað seinasta samdøgrið er prísurin á Brentoljuni fallin úr 112 dollarum í 105,6 dollarar fyri tunnuna. Tað er 5,7 prosent, men tann amerikanska WTI-ráoljan er fallin uppaftur meira, nevnliga átta prosent. Greinarar siga, at tað er óttin fyri búskaparligari afturgongd, sum órógvar marknaðin, tí afturgongd í búskapinum ger, at minni eftirspurningur verður eftir olju. Men onnur viðurskifti ávirka eisini prísin. T. d. tað at IMF hevur sagt, at tann evropeiski bankaheimurin er ikki nóg sterkur, og í USA kom samveldisbankin ikki við tí stimbrandi átakinum, sum fleiri høvdu væntað. Men tað er ikki bara oljuprísurin, sum fellur. Á virðisbrævamarknaðunum í Evropa er stórt fall í dag. Í París er fallið oman fyri fimm prosent, og í Frankfurt er tað næstan fimm prosent. Í Keypmannahavn er C20-vísitalið fallið 3,4 prosent.